LÖGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

3. mars 2016

**Til Páll á Reynatúgvu, løgtingsformann.**

Undir ófráboðaðu fyrispurningunum í Løgtinginum í gjár, var svar mítt ikki nóg fullfíggjað, tá ið eg varð spurdur um eina starvssetan á Løgmansskrivstovuni.

Undir orðaskiftinum nevndi eg, at eingin búskaparfrøðingur søkti starvið sum deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni. Hetta er ikki rætt. Eftir orðaskiftið í gjár havi eg fingið upplýst, at búskaparfrøðingar søktu starvið sum deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni.

Løgmaður er ikki partur av sjálvari metingartilgongdini, tá ið starvsfólk verða sett í starv á Løgmansskrivstovuni. Av somu orsøk hevði eg ikki kunnleika til tey, ið søktu nevnda starv.

Tað ber ikki til at fyrireika seg til ófráboðaðar fyrispurningar í Løgtinginum, og svar mítt í gjár var sostatt eftir míni bestu sannføring og grundað á eina skjóta fatan av nevnda setanarmáli, sum eg ongan leiklut hevði í.

Tað harmar meg, at munnliga svar mítt ikki var nóg fullfíggjað.

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – Fax: (+298)306015 – e-mail: info@tinganes.fo - www.tinganes.fo